ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

31. mai 2022
Mál: 22/09886
Viðgjørt: KÁ

Nr. 52-191/2021

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-191/2021 eftir tingskipanini § 52a til Sólvit E. Nolsø, landsstýrismann við almannamálum, frá Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingsmanni, at umvæla og umbyggja gamla HF-skúlan í Klaksvík

Spurningar:

1. Hvussu gongur við verkætlanini at umvæla og útbyggja gamla HF-skúlan í Klaksvík, so hann kann hýsa hølum til endur- og viðlíkahaldsvenjing, hølum til økisdeildina hjá Almannaverkinum og skrivstovum til eindarleiðarar hjá Almannaverkinum?

Svar:
Almannaverkið hevur gjørt eina avtalu um at leiga hølir á Klaksvíksvegi 60, sum vanliga verður nevndur HF-bygningurin. Ætlanin var, at Almannaverkið skuldi flyta inn í hølini móti sumri.

Almannaverkið hevur nú fingið at vita frá útleigaranum, at umbyggingin av hølunum dregur út, tí bíðað verður eftir handverkarum. Hølini verða tessvegna klár til nýtslu nakrar mánaðir seinni enn ætlað.

Tórshavn, 31. mai 2022

Sólvit E. Nolsø
landsstýrismaður

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo